


www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 11 - 2012

# Oljuleiting á Vitra portali

Í seinastu viku lat fyrsti føroyski e-bókaportalurin, Vitra (www.vitra.fo) upp. Á Vitra er møguligt at keypa eina røð av ymiskum føroyskum bókum sum e-bøkur. Millum tær umleið 100 bøkurnar, ið higartil eru at finna á Vitra, er The Proceedings of the 3rd FIEC, ið er útgivin av Fróðskapi í samstarvi við Jarðfeingi. Heimasíðan hjá Jarðfeingi skirvar, at bókin, ið er skrivað á enskum, inniheldur fimm jarðvísindaligar greinar, sum viðgera evni, ið kunnu vera við til at betra okkara vitan um jarðfrøðina og harvið møguleikarnar fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum. Sum fakbók hóskar greinasamlingin seg væl sum e-bók. Hon kostar kr. 98,00 og kann keypast her - http -//www.vitra.fo/show_product.php?ProductId=95. Tað er forlagið Sprotin við Jonhardi Mikkelsen sum stjóra, ið stendur fyri hesum fyrsta føroyska e-bókaportali. Í næstum verða Proceeding of the 1st og 2nd FIEC eisini tøkar á Vitra.